## DAGSINS MEINING

# Ljós fyri framman!

Mong eru skelkað av framferðini hjá Miðflokkinum. Ikki minst hava umboð fyri Tjóðveldisflokkin víst sína stóru ónøgd. Anita á Fríðriksmørk skýrir samstarvsflokkin fyri valdsmisnýtslu. Og floksfelagin Tórbjørn Jacobsen viðgongur, at tað var eitt mistak, at Tjóðveldisflokkurin fór í samstarv við Miðflokkin, og at tíðin er komin til at taka í egnan barm og skifta út flokkin við Javnaðarflokkin. Í kjalarvørrinum á teimum hava onnur eisini tala harðliga at framferðarháttinum hjá landsstýrismanni Miðfloksins at velja bara síni egnu fólk í nevndir. Hvat kann hetta brúkast til ella skal tað brúkast til nakað! Sjálvandi skal tað tað. Tíanverri hevur løgmaður valt at lata standa til. Hinvegin skal sigast um løgmann, at tað ongantíð var ynski hansara – skulu vit trúgva honum – at taka Miðflokkin við í samgonguni. Var tað ikki nettupp formaðurin hjá Anitu og Tórbirni, sum longu valkvøldið setti ynski fram um at fáa Miðflokkin uppí gomlu samgonguna! Tí liggur bólturin í hondunum á formanni Tjóðveldisfloksins. Hvat sigur hann til avgjørdu úttalilsini hjá sínum floksfeløgum, og til útrøttu hondina til Javnaðarflokkin? Nakað, sum eisini løgmaður hevur nevnt fleiri ferðir áður. At tað fór kanska bara at vera ein spurningur um tíð, til boð vórðu eftir Javnaðarflokkinum at styrkja samgongugrundarlagið. Spurningurin er, um tann tíðin nú er komin.

Tá hugsað verður um, at løgmaður ongantíð var heitur fyri at taka Miðflokkin við í samgonguna, og at tað nú í Tjóðveldisflokkinum eru framstandandi fólk, ið vilja skifta út Miðflokkin við Javnaðarflokkin, verður áhugavert at hoyra, hvørja støðu formaðurin í Tjóðveldisflokkinum hevur. Verandi samgonga hevur longu spælt fallitt. Miðflokkurin hevur tíanbetur avdúkað, hvat hann stendur fyri og hvat kann væntast av honum. Og hetta hava týðandi Tjóðveldisfólk innsæð. Tað er tó løgmaður, sum ger av, hvør skal vera í samgongu og ikki. Men tekur formaður Tjóðveldisfloksins undir við teimum signalum, ið eru komin frá hansara fólki, er greitt, at vit hava fingið eina heilt nýggja og áhugaverda parlamentariska støðu í Føroyum. Spurningurin er, um ikki Javnaðarflokkurin eisini eigur at geva sær far um hana. Hóast floksformaðurin helst sá eina samgongu, har Sambandsflokkurin eisini er við, er hann noyddur at síggja veruleikan í eyguni, at tað í løtuni finst ikki ein meiriluti, har tað er pláss fyri bæði Javnaðarflokkinum og Sambandinum. Og tá hugsað verður um, hvussu nógv mál Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin í veruleikanum eru samdir um, og at hesir flokkar seinastu 30 árini hava samstarvað helvtina av teimum, er spurningurin nú, um ikki tíðin er búgvin til at grava tær stríðsøksir, sum fullveldistilgongdin hevði við sær, og at hesir báðir flokkar fara at reka konsensuspolitikk. Men tað krevur, at leiðararnir nærkast hvørjum øðrum. Vilja teir tað, verður stóri spurningurin, um løgmaður heldur tað vera so skilagott at fáa ein sterkan mið-vinstravong í samgongu. So enn eru langt frá allar súðir syftar. Men eitt týðuligt signal frá C og E um, at teir loksins kunnu góðtaka ta breiðu samgonguna hjá løgmanni, ACE, er møguliga tað, ið skal til fyri at sleppa løgmanni at liva upp til sítt ynskibarn seinastu mongu árini. Miðflokkurin kann so bara takka sær sjálvum fyri, at brúk ikki er fyri honum meira. Kanska er ljós fyri framman. PS Tjóðveldisflokkurin kann fáa stórar trupulleikar við sínar veljarar vendir hann ikki Miðflokkinum bakið nú beinanvegin.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sjónvarpið og bilaprísir



**Journalistarnir hjá SvF hava ikki gjørt sítt kanningararbeiði til lítar í málinum um bilaprísir, sigur stjórin hjá Ford, sum skírir avrikið hjá SvF makkverk og journalistiskt óetist, tá SvF heingir Ford út sum ein óseriøsan handil, ið tekur okursvinning**

**Peter Smidt Petersen, stjóri P/F Wenzel**

Sjónvarp Føroya hevur seinastu dagarnar funnist harðliga at bilasølunum, m. a. Ford, tí hesar skulu taka okursprísir fyri nýggjar bilar og harvið meira ella minni snýta kundarnar. Kritikkurin hevur verið ógvuliga einsíðugur og tendensiøsur, og nú er hann eisini at hoyra í politiska umhvørvinum.

Journalistiskt er tað kanska ein góð søga, men í veruleikanum tosa vit um nakað heilt annað. Birt verður uppundir eitt kartelsamstarv, og eg veit ikki hvat. Áðrenn kjakið púrasta fer av sporinum, haldi eg, at neyðugt er við nøkrum hart tiltrongdum rættleiðingum. Eg kann ikki óátalað góðtaka mátan, sum tingini eru sett fram uppá. Her hjá Ford hava vit ein sobran og sjálvstøðugan handilspolitikk. Vit fyrihalda okkum sjálvandi til yvirornaða politikkin hjá Ford Motor Company A/S.
Hvussu er so ein bilahandil í veruleikanum skrúvaður saman? Tá handlað verður, er talan um ein nýggjan bil og ein brúktan bil, eins og ymiskt afturat, so sum onkur eykaútgerð, vetrardekk o. s. fr. Alt hetta verður sett saman í eitt tilboð, sum báðir partar góðtaka. Umframt hetta skal fyrilit eisini takast fyri reklamatiónum o. s. fr. Her í húsinum hava vit ein reklamatiónspolitikk, sum førir við sær, at vit geva meira garanti, enn Ford Motor Company krevur, t. v. s. at reklamatiónsstøðið er munandi hægri her enn í okkara grannalondum. Hetta kostar sjálvandi. Tað er eisini upp á sítt pláss at nevna, at klárgeringarkostnaðurin her er munandi hægri, at burturbeiningargjaldið er íroknað, at vit hava stórar farmaútreiðslur, vit hava nógvar mannatímar kring klárgering, skrásetinga v bilunum. Pappírgongd, heintan og gerð til sýn v. m. Tá skipanin her fyri hvønn einstakan bilhandlara er munandi meira umstendiligur enn aðrastaðni.

Tá tá alt kemur til alt kann eg upplýsa, at bruttovinningurin fyri hvønn selda nýggjan bil í 2001 var umleið 15.000 kr og á brúktum bilum var bruttuvinningurin 0 kr. Til samanberingar kann nevnast, at bruttovinningurin í Danmark er 10-20.000 kr fyri brúktan bil.

Av hesum bruttovinningi skal so gjaldast húsaleiga, lønir, hiti, edv, telefon, grannskoðan, reklamatiónir, garantiveitingar, reingering o. s. fr.

Á bilasøludeild okkara eru vit 6-7 starvsfólk. Vit seldu umleið 180 nýggjar bilar í 2001. Nú kann sjálvandi ein og hvør taka lítla lummaroknaran og síggja, at hetta ikki gevur nakað milliónayvirskot og afturat eru eisini rentur og avskrivingar.

Hesi tøl eru roknað av ríkisgóðkendum grannskoðara, eisini ber til at fara til Skráseting Føroya at fáa fatur á roknskapinum – her eru eingi loyndarmál.

Rakstrarúrslitið hjá okkum er í veruleikanum heldur ikki nóg gott, tí vit mugu alla tíðina menna okkum, gera okkum betri, vit skulu umbyggja, útbyggja, íløgur skulu gerast – og starvsfólkið skal útbúgvast.

Tendensurin, eg síggi, er at tað næstan skal kriminaliserast at tjena pengar – og helst skal tað eisini verða so, at tú bert kanst tjena pengar, um tú snýtur onnur.

Eg má siga, at tað er sum stormur í einum vatnglasi. Ein smálutur verður drigin úr heildini – og so verður buldrað fram. Rætti framferðarhátturin hevði sjálvandi verið at gjørt sítt fyrireikingararbeiði til lítar. Journalistarnir hjá Sjónvarpi Føroya skuldu helst ikki verið eitt undantak í somáta. Men tað, sum teir hava gjørt í hesum máli, er makkverk úr enda í annan, og journalistiskt er tað óetiskt, tá tey heingja Ford út sum ein óseriøsan handil við okursvinningi.

Hesum vil eg upp á tað allar kraftigasta mótmæla.

Vit reka eitt virki við nógvum framúrskarandi produktum og góðum tænastuveitingum. Vit seta kundan í sentrum, vit royna sjálvandi eisini at tjena pengar, og tað er nú ikki forboðið, men at seta okkum fram sum snýtarar skulda tað, ið her er greitt frá, kunnað víst aftur.

# Brúkarasamstarv í Útnorði

Norðurlendska brúkaranevndin (NKU) hevur tosað um útnorðurbrúkarasamstarvið á fundinum í Havn 12. september 2002.
NKU hevur staðfest, at hóast útnorðursamstarvið er ein týðandi partur av norðurlendska brúkarasamstarvinum, hevur verið nýtt lítið av peningi og organisatoriskari orku til at menna hatta samstarv víðari. Hetta er spell fyri brúkaran í Íslandi, Føroyum og Grønlandi.

Út frá hesum vil NKU heita á leiðslubólkarnar, brúkarafeløgini, granskaranetverkini o. a. brúkarastovnar um at menna tiltøk, sum styrka útnorður brúkarasamstarvið við m. a.:

– Kæruviðgerð
– Marknaðarføring
– Brúkaraupplýsing
– brúkaraskipan og brúkaraávirkan.

NKU heitir eisinni á Norðurlandaráðið um at kunna betri um tær stuðuls- og umbýtingarskipanir, sum eru á hesum øki – og eisini um aðrar stuðulsmøguleikar til nýtslu í útnorði, sigur nevndin í NKU (Nordisk Konsumentudvalg) í tíðindaskrivi.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Vísindaliga siðsemisnevndin

**Annita á Fríðriksmørk, tingkvinna fyri Tjóðveldisflokkin**



Eigur at hava eina breiða fólksliga umboðan og eina vísindaliga styrki

### Endamálið við arbeiðnum

Arbeiðið hjá eini vísindaligari siðsemisnevnd (vísindalig etisk nevnd) er at taka støðu til um granskarar skulu sleppa at granska í ymiskum, sum hevur við biomedisinskar ætlanir at gera. Arbeiðið er sostatt, at taka støðu til biomedisinskar granskingarætlanir. Hetta arbeiði umfatar tvey øki: tað etiska og tað vísindaliga.

Ikki sørt av fokus er sett á umrødda valið av limum í siðsemisnevndina. Eisini er funnist at mær, og tí sum eg segði frá tingsins røðarapalli.

### Kvalifikatiónir ella sannføring

Ein av persónunum, sum hevur funnist at hesum er Elin N. W. Tausen. Tað eg kenni Elina, eru vit samdar um okkurt, um ikki alt. Og soleiðis var eisini í grein hennara í farnu viku. Okkurt av tí hon skrivar um meg, taki eg fult undir við, meðan eg síggi meginpartin frá einum øðrum vinkli.
Elin skrivar m.a.: eg visti ikki, at í hesum landi verða tínar kvalifikatiónir dømdar eftir, hvørjum trúarsamfelag, tú kemur úr. Til tað er at siga, at tað var heldur ikki vanligt. Og eg eri samd við henni í, at tað heldur ikki eigur at verða so. Men tað er júst tað, sum er trupulleikin í hesum umtalaða nevndarvali. Landsstýrismaðurin hevur eina og aleina hugt at trúarrættningi og ikki eftir útbúgving teirra, og heldur ikki eftir, hvussu breiða fólksliga umboðan hesi hava. Og tað er tað, sum er kjarnin í málinum.

### Manglaðu tey frákoyrdu útbúgving ella royndir

Um talan var um útbúgving, hvat var so galið við teimum fýra, sum sótu. Ein er biologur og granskari og leiðari á náttúruvísindadeildini. Ein er farmaseutur og granskari. Ein hevur fleiri ára royndur sum jurist, og ein hevur drúgvar royndir sum prestur.

Nú sigi eg ikki, at júst hesi fólkini partú áttu at verið afturvald, men at hesi við sínum vísindaligu royndum og við síni breiðu fólksligu umboðan livdu upp til endamálið í lógini er eyðsæð.

### Ein umbering uppá sítt pláss

Elin heldur, at tað líktist ongum, soleiðis sum eg fór við nøkrum av nývaldu limunum. Eg eri samd í, at eg var í so mælsk, tá ið eg fanst at lektaranum, sum eg helt uppá var uttast til høgru, og sum var í ferð við at ríva seg leysan úr fólkakirkjuni. Mín umbering skal so eisini síggjast í tí, at tað er ringt at finnast at valinum, um tú ikki kanst finnast at persónum, tí tað eru persónarnir, sum eru trupulleikin, – ikki hvar teir hoyra heima, men teirra sannføring í etiskum spurningum. Men fyri tað, átti eg at vanda mær um orðavalið. Og vil eg biðja um umbering fyri hetta.

### Fundamentalisman í demokratinum

Um landsstýrismaðurin var sína uppgávu vaksin, og tók hædd fyri eini breiðari fólksligari umboðan, so kundi hann um ikki annað valt éin við hasari sannføringini, ikki fýra. Soleiðis hevði hann eisini tryggjað sær, at hansara sannføring var umboðað og ikki avgerandi. Tí sum avgerandi tekur minnilutin ræði á meirilutanum.

Sum dømi kann nevnast um t.d. Helena Dam á Neystabø, sum valdi nevndina í 1999, valdi fýra limir frá Suðurstreymoyar Sjálvsstýrisfelag. Hetta skurrar sjálvsagt í oyrunum á øllum. Tí tað eru altso nøkur ting, sum tú ikki kanst loyva tær í einum demokratiskum stýri.

At so fundamentalisman til alla tíðir hevur undirvurderað demokratiið og sett sín fundamentalistiska hugburð oman fyri alt, er ein sannroynd, sum vit eiga at vara okkum fyri ikki endurtekur seg her. Eg sigi ikki hervið, at Bill er fundamentalistur, men at hann her hevur undirgravað ta breiðu fólksligu umboðanina og harvið demokratiið, slepst ikki uttanum. Og tað er tað, sum eg royni at peika á.

Hvør er tað nú sum gongur við eini stjørnu?

Elin skrivar eisini: Ja, kanska áttu vit øll, sum ikki hoyra til fólkakirkjuna at gingið runt við eini stjørnu ella onkrum líknandi, sum vísir, hvørji vit eru, so at ongin skal ivast í, at vit ikki eru kvalifiseraði nokk til at taka ábyrgd og avgerðir. Hetta helt eg nú var ein óhugnalig útlegging. Men hvussu er og ikki, hvør er so í hasi støðuni í dag? Hvørji eru tey, sum eru vrakað í hesum føri, og sum ikki eru kvalifiserað nokk til at taka ábyrgd og avgerðir? Og sum orsakað av síni sannføring ikki sleppa upp í nevndina?

### Kontinuteturin ein grundgeving

Landsstýrismaðurin hevur grundgivið fyri sínum nevndarvalið, at neyðugt var at skifta limirnar út fyri at varðveita kontinuitetin, – annars vórðu allir sjey limirnir sambært galdandi lóg skiftir út, tá ið hetta valskeiðið var runnið. Men til tað er at siga, at hann samstundis hevur boðað nývaldu limunum frá, at hann hevur ætlanir um at leggja broytingaruppskot fyri tingið, sum tryggjar, at hesir limirnir kunnu sita í longri tíðarskeið enn tvey valskeið. Fyri, sum hann sjálvur orðar seg, at tryggja kontinutetin í nevndini. Og hesum uppskotið kemur hann við, nú hann hevur fingið sítt fólk í nevndina.

Eg havi ikki blandað O.K. Olofson uppí!

Eg lesi eisini í Sosialinum, at Bill Justinussen finst at mær, tí eg skal hava funnist at, at ein av nevndarlimunum í nývaldu nevndini er gift við O.K Olofson. Hesum vísi eg hvassliga aftur, eg havi ongastaðni í sambandi við umrødda nevndarval nevnt hann við einum navni ella sett hana í samband við hann.

# Garðbrótarar og siðsemi

**Eyðun Andreassen, formaður í Granskingarráðnum**



Tey fólkini, ið heilsumálaráðharrin Bill Justinussen nú hevur sett sum umboð í vísindaligu siðsemisnevndina eru ivaleyst hampafólk øll somul. Eg hugsi tað, hóast eg ikki kenni nakran av teimum persónliga. Men við teimum sjónarmiðum, hesi fólk umboða, hevði læknakynstrið enn í dag staðið á heimadoktarastigi við gandi sum berandi ráðum í heilsuviðgerð, og náttúrufrøðin øll hevði ikki verið komin longur, enn at vit og børn okkara enn í 2002 høvdu lært í skúlanum, at sólin melur í kringi rundan um eina pannukakuflata jørð, ið sum miðásurin í guds skapanarverki ikki flytir seg úr stað.

Listin er langur við fólki, sum í síni tíð hava brotið niður steinrunnar tulkingar um guddómligar heimsmyndir, ið skula eitast at vera at finna í Bíbliuni, og harvið hava flutt mørkini fyri vitan okkara nærri sannleikanum um himmal og jørð. Fyri tað hava hesir djørvu og visioneru garðbrótarar, verið forfylgdir, revsaðir, fingið arbeiðsforboð, verið lýstir í bann og enntá tiknir av døgum av samtíðarinnar variantum av júst teimum sjónarmiðum, ið nú skula ráða yvir dagsins medisinsku náttúrufrøði.

Eg illteinki ongan av teimum nýggju limunum í vísindaligu siðsemisnevndini fyri fyri at vilja drepa, forfylgja ella lýsa nakran granskara í bann. Men eg illteinki tey fyri at vilja seta forboð fyri gransking. Ikki við etiskum grundgevingum, men við grundgevingum úr teirra egnu persónligu bíbliutulkingum. Tað haldi eg vera álvarsligt. Tí etikkur og bíbliutulking er ikki tað sama.

Eg haldi tað er av grundleggjandi týdningi at hava eitt livandi kjak um etiskar spurningar í sambandi við medisinska og ikki minst gentøkniliga gransking. Tað høga tøkniliga støði og teir møguleikar, ið harav eru í eygsjón í okkara tíð, gera tað serliga átroðkandi við etiskari umhugsan. Eg kenni meg ofta persónliga órógvaðan av tí eg lesi og hoyri um innan eitt nú gentøkniliga gransking, men sertakliga av summum av teimum økjum, har tey genteknologisku granskingarúrslitini verða brúkt. Her kemur ofta bland í hjá teimum kjakandi. Lat meg taka eitt dømi fyri at lýsa munin millum granskingina sjálva og tær fylgjur ella tað misbrúk, ið granskingarúrslitini føra til. Ein tann tyngsti tankin at bera hjá okkum, ið liva í vesturheiminum í nútíðini er teir ræðuleikar, ið standast av lívfrøðiligari og bakteriologiskari krógsførslu. Hetta eru hópdrápsteknikkir, ið m.a. og kanska einamest vesturheimurin brúkar hvønn einasta dag onkra staðni í verðini. Í øllum førum er hvønn einasta dag okkurt stað í heiminum, ið ikki kennir sviðan av hesum vápnum, antin tey verða brúkt beint nú ella hava verið brúkt. Hetta hendir beint nú í mótsetning til kjarnorkuvápnini, ið hóast alt mær vitandi ikki hava verið brúkt síðani 1945. Men er tað harfyri nøkur orsøk til at steðga allari baktereologiskari og lívfrøðiligari gransking. Og hvat skuldu Jenis av Rana og hansara starvsfelagar sagt og gjørt við sínar sjúklingar, um ikki granskað verður íðuliga og staðiliga innan baktereologi og lívfrøði?

Siðsemisnevnd og eisini alment orðaskifti um etiskar spurningar er alneyðugt. Men ofta eru etisku spurningarnir meira politiskir enn granskingarligir. Men ikki bara, tað er rætt, tí bæði ein og fleiri granskarar í søguni eru onkuntíð farnir langt út um øll siðsemilig mørk í sínum virki.

Tað sum tó eigur at vera klettagrundin her er, at tað ongantíð eiga at vera persónligar bíbliutulkingar ið leggja premissir fyri eitt etiskt orðaskifti av so stórum týdningi. Etikkur og bíbliutulkingar eru hvør sítt.

Eg eri bangin fyri, at hesi serligu fólkini, ið nú manna siðsemisnevndina, eru slík, ið byggja sjónarmiðini á sínar serstøku bíbliutulkingar av tilveruni og vísindunum. Tað skilji eg frá tí kjaki, sum hevur verið alment frammi í bløðunum. Tessvegna er tað mín niðurstøða, at hesi í allar mátar hampafólk annars, ikki eru egnað til at umboða Føroya fólk og leiða eitt kvalifiserað etiskt orðaskifti um teir sera álvarsligu spurningar, siðsemisnevndin hevur at arbeiða við.

Tað er so eitt, at grundir eru fyri at halda, at eitt alneyðugt siðsemiligt orðaskifti ikki er í nóg góðum hondum. Í besta fall tí samansetingin av nevndini er ov einsíðug og lítið umboðandi fyri veruleikan í Føroyum. Hvørki fólkið ella granskingin hevur hetta uppiborið.

Verri er tað tó, at nevndin eftir øllum at døma er vald við illum vilja. Bill Justinussen sigur, tá hann varð spurdur í tinginum, at hann ikki kennir hesi valdu fólkini. Her lýgur Bill Justinussen so langur sum hann er. Fyrigev mær orðingina Bill, men tú kendi teirra meiningar, tá tú valdi tey. Og tað var tað, spurningurin snúði seg um. Hvønn tú kennir privat er óviðkomandi. Eg vil halda upp á, at tú vitandi og við við vilja valdi hesi fólkini, tí tey umboða tíni privatu og sera víðgongdu átrúnaðarligu sjónarmið. Tí er tað í besta føri ein roynd at sleppa undan at svara rætt til spurningin frá Anitu á Fríðriksmørk, tað tú segði um, at tú ikki kennir fólkini, og í versta og sannari føri ein beinleiðis lygn.

At hava Bíbliuna í hondini og lygn á tunguni eru tvey ógvuliga sterk vápn, ið ikki boða gott fyri gransking í Føroyum.

Nú mást tú fyrigeva mær orðalagið, ið eg tó haldi er neyðugt í hesum føri. Eg skrivi hetta sum formaður í Granskingarráðnum, men má, fyri at rætt skal vera rætt, eisini siga frá, at Granskingarráðið sum so einki hevur við hesa grein at gera.